**Býráðsfundur 22.04.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 38/2024 – Umsókn um byggiloyvi matr. nr. 474h – Argja Smíð | ALMENT |
| Mál nr. 39/2024 – Eykajáttan til Roðan 2. viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 40/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 41/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 42/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 43/2024 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 38/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Argja Smíð ALMENT**

J.nr. : 1201-5-2024

Í teldubrævi dagfest, tann 25.03.2024, søkir Remi Olsen vegna Argja Smíð, um byggiloyvi til tvíhús á Lýðarsvegi 38, matr. nr. 474h.

Húsið er tilsamans 19m langt og 8,5m breitt. Nýtslustigið er 0,398. Húsið lýkur allar ásettu treytirnar í byggisamtyktini.

**Á fundi, tann 09.04.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva byggiloyvi sambært innsendu tekningum dagfestar tann 18.03.2024.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 39/2024 – Eykajáttan til Roðan 2. viðgerð ALMENT**
J. nr.: 1105-6-2023

Tá fíggjarætlanin 2024 fyri Roðan varð løgd, varð hon bygd á fyribils tøl út frá fólkatalinum (67+ ) pr. 01.09.2023. Býtið var tá góð 21% til Nes kommunu, sum svaraði til kr. 20.055.515.
Nú eru tølini pr. 01.01.2024 klár. Býtið er broytt, so at Nes kommunu skal fíggja sløk 22%, sum svarar til kr. 20.511.322.

Hetta hevur við sær eina meirfígging á kr. 455.817.

**Á fundi, tann 19.03.2024, mælir Fíggjarnevndin til at játta meirfíggingina á kr. 455.817. Fíggingin verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi, tann 18.04.2024, mælir fíggjarnevndin til við 2. viðgerð at halda fast við samtyktina frá 1. viðgerð og at játta meirfíggingina á kr. 455.817. Fíggingin verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**